## DAGSINS MEINING

# Munur á monnum

Ymiskt er sum menn tulka gongdina í samráðingunum við Danmark. Stýri, ið annars ikki hava verið kend fyri sítt diplomatiska snildi, hava eftir øllum at døma megnað at fingið gongd á konstruktivar samráðingar við danir. Dømi um hetta eru málini um yvirtøku av flogvøllinum og skipasýninum.

Tá Fólkaflokslandstýrismenn og ikki minst løgmaður megna at fáa gongd á yvirtøkur í semju við danir, so tykist tað løgið, at alt, sum Tjóðveldisflokkurin nertir við endar í klandri og roki. Er tað við vilja?

Tann gongd, ið Fólkaflokkurin stendur fyri kundi ivaleyst fingið partvísa undirtøku í andstøðuni. Ein konstruktiv varin gongd, har yvirtikið verður eftir heimastýrislógini. Harða linjan hjá formanni Tjóðveldisfloksins førir eftir øllum at døma ongastaðnis, og tí eigur Tjóðveldisflokkurin at endurumhugsa sína støðu. Teir hava nú bakkað so nógv í fullveldismálinum, at tey fáu fet, ið nú eru eftir til at semjast við allar politisku flokkar á tingi áttu ikki at gjørt mun. Trupulleikin er so bert, at Tjóðveldisflokkurin ivaleyst ikki hevði fingið stórvegis undirtøku til næsta val, tí verðin knappliga ikki var so svørt og hvít sum Høgni Hoydal vil gera hana til.

Tað er ikki gott, um varaløgmaður uppá forhond útilokar, at danir kunnu vera konstruktivir. Hann hevur ein risastóran forkláringstrupulleika við at løgmaður og floksfelagar hansara hava eitt mennandi samskifti við danir, meðan tað á málsøkjum hjá Tjóðveldisflokkinum einki ber til.

Eftir øllum at døma hevur løgmaður enn einaferð megnað at sett Tjóðveldisflokkin uppá pláss við at kunna vísa á úrslit, um man nú skal trúgva øllum tí, sum hevur verið umrøtt í sambandi við telefonsamtaluna millum løgmann og danska forsætisráðharran. Hinvegin eigur løgmaður eisini at gera sær greitt, at stórur partur av Føroya fólki fer neyvan at taka undir við so stórum skerjingum í blokkinum, sum nú verður lagt upp til. Ein hóvligari gongd hevði hóskað betur. Vit skulu bara vera vitni til nøkur bakkøst í búskapinum og skerjingin av blokkinum kann vísa seg at vera sera vandamikil.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Olja, dreymur – veruleiki

**Kári P. Højgaard**
*løgtingsmaður*



Í oljumálinum hevur mangur smílst speirekandi og nevndi onkur, at Føroyar mundi vera einasta land í verðini, sum tá samgongan varð skipað, hevði ein oljumálaráðharra og onga oljuvinnu tíansheldur olju. Stillisliga hevur ráðharrin gingið um hurðarnar saman við umsitingini og hava tey gjørt eitt so dygdargott arbeiði, at serfrøðingar á økinum hava givið teimum besta skoðsmál fyri verkið. Meti at flestu føroyingar eru glaðir fyri tað arbeiðið umsitingin, oljumálastýri og ráðharrin higartil hava lagt úr hondum í fyrireikingunum til føroyska oljuvinnu. Nógvir føroyingar ræðast ávirkanina, sum kann standast av kolvetnisframleiðslu. Løgmaður vísir á at tað fer at føra til broytingar í samfelagnum, men ikki neyðturvuliga til tað verra. Tað er skyldan hjá myndugleikunum at byrgja upp fyri, at ávirkanin endar við at avskepla okkara mál, mentan og samfelag. Her eri eg fullkomuliga samdur við løgmanni. Sum maðurin tók til á sinni. »Ongin setir seg í búgv í Føroyum av praktiskum orsøkum«. Tað hevur í mongum førum kostað blóð, sveitta og tár, at fingið útkomuna, sum í flestu førum kom úr havinum. Hetta hevur m. a. gjørt, at Føroyar ikki hava verið yvirskipaðar. Tað er tó ein vandi sum eg síggji fyri mær og tað er, at samfelag okkara er so lítið og viðbreki. Framrokningar vísa at fólkatalið verður um tey 47000 við árskifti.

Eg hugsi ikki, at nakar trupuleiki er, um nøkur túsund fólk í einum avmarkaðum tíðarskeiði flyta til Føroyar at arbeiða. Men vit eru partur av danska ríkinum og er býtislutfallið í fólkatalinum umleið eitt til hundrað og hava danir, grønlendingar og føroyingar sama ríkisborgararætt. Um allir føroyingar fluttu til Danmarkar hevði hetta neyvan havt tað stóru ávirkanina, tí landið er so stórt.

Hinvegin, nýta t. d. 1,5% av dønum henda møguleika, at koma til oljuævintýrið í Føroyum, kunnu vit upp á heilt stutta tíð koma at verða ein minniluti í okkara egna landi.

Her er sum sagt nakað at hugsa um, og eigur at verða viðgjørt í størsta álvara. Áland er sum kunnugt í ríkisfelagskapi við Finlandi og hevur so vítt eg veit í lógávu sínari tryggja, at tað hetta ikki kann henda.

# Granskingarráðið sett

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur sett nýggja ráðið fyri Granskingargrunn Føroya frá 1. august 2001.

Ráðslimirnir eru hesi:
**Richard Schwartson,** tilnevndur av lstm. í heilsumálum.
**Maria Róin**, tilnevnd av lstm. í vinnumálum.
**Jens Helgi Toftum**, tilnendur av lstm. í fiskivinnumálum.
**Malan Marnersdóttir**, tilnevnd av lstm. í granskingarmálum.
**Guðri Andorsdóttir**, tilnevnd av Føroya Arbeiðsgevarafelag.
**Ragnar Joensen**, tilnevndur av Føroya Arbeiðsgevarafelag.
**Bogi Hansen**, formaður, tilnevndur av landsstýrimanninum í granskingarmálum.

Limir Granskingarráðsins skulu hava skil fyri strategiska týdninginum, sum gransking hevur fyri samfelagið ella hava granskingarførleika. Ráðið hevur ovastu leiðsluna yvir Granskingargrunninum, yvirskipaðu ábyrgdina av, at ásetingarnar fyri virksemi grunsins verða fylgdar, og at grunnurin virkar samsvarandi endamálinum.

Millum mest týðandi uppgávur Granskingarráðsins kunnu verða nevndar: at ráðgeva landsstýrinum og vinnulívinum í granskingarpolitiskum spurningum, leiðbeina og ráðgeva granskarum í granskingarspurningum og at umsita Granskingargrunnin og taka endaliga støðu til, hvørjar umsóknir skulu verða stuðlaðar.

Granskingarráðið og tann Grunnur, sum verður umsitin av Ráðnum, eru at meta sum frambrot í føroyskum granskingarpolitikki, og eitt av høvuðsendamálunum við hesum politikki er at menna vinnugranskingina og sum heild at taka vinnuna inn í granskingarpolitisk viðurskifti. Eisini skal Granskingarráðið fylgja við menningini innan føroyska og millumtjóða gransking, ráðgeva í sambandi við fyrireiking og skipan av granskingarlóggávu, ráðgeva í spurningum um, hvussu granskingin kann gerast mest gagnlig fyri samfelagið – bæði á almenna og privata økinum – og ráðgeva í sambandi við gagnnýtslu av granskingarúrslitum og útbúgving av granskarum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.